# FM snarkapping 1. juli

*Talv: Leygardagin 1. juli verður stór FM snarkapping í Kommunuskúlaskálini. Sera góðar peningavirðislønir verða givnar*



CARL ELI NOLSØE ”AMUELSEN

Árið 2000 hevur higartil sanniliga verið eitt ríkt og spennandi talvár, og enn eru nógv stór og avbjóðandi tiltøk í væntu. Í seinastu viku funnu vit einstaklingaføroyameistaran, og komandi tiltak er FM í snartalvi.

Talvsambandið avgjørdi á Páskum, at FM í snartalvi í ár skuldi roynast sum kapping ið ikki var bundin at aðrari kapping. Gamalt var at kappingin var heft við FM einstaklingkappingina, men nú verður so roynt á annan hátt.

Kappingin er fyri øll, ung sum gomul, og byrjar kl. 11.00 leygardagin 1. juli. Kappingin verður skipað á øðrvísi hátt enn undanfarin ár. Talan er um at hava ein opnan bólk við nógvum umførum, men enn er einki avgjørt.

Sum nakað nýtt verða peningavirðislønir givnar teim fremstu, og fyri at øll skulu hava ein møguleika at ogna sær nøkur oyru verða sokallaðar ratingvirðislønir eisini givnar. Tilmelding er á staðnum og luttakaragjaldið er 50 kr. Talvsambandið heitir á fólk at tekna seg hálvan tíma áðrenn kappingin byrjar.

EM fepurin herjar yvir alt landið, men leygardagin 1. juli verður eingin fótbóltur á skránni, tí tá hava finalistarnir nevnliga frídag undan finaluni sum verður leikt 2. juli. So tað ber til bæði at telva og síggja fótbóltsfinaluna.

Eru spurningar, er møguleiki hjá tær at vitja heimasíðuna www.sam-teld.fo/talv, og síðani klikka á *Talvtos*, har møguleiki er seta spurningar og kjakast.

### GM kappingin í heyst

Nú er greitt, at stóra altjóða GM kappingin í oktober verður veruleiki. Talvsambandið hevur bíðað eftir svari frá Norðurlendska ráðharraráðnum um fíggjarligan stuðul, og svarið varð positivt.

Manningin í kappingini verður ein góður blandingur av sterkum stórmeistarum, ungum altjóða meistarum og síðani tíggju teir fremstu føroysku telvarnir.

Fyri teir føroysku telvarnar er kappingin ein sera góð upphiting til OL, sum byrjar seinast í oktober mánaða í Turkalandi.

Telvað verður í Norðurlandahúsinum í døgunum 6 - 14. Oktober undir leiðslu av altjóða talvdómarinum og dananum Mogens Nielsen.

### John Arni í Svøriki

Føroya besti telvari í løtuni John Arni Nilssen, hevur luttikið í einari IM kapping í Stokkholm. Níggjunda og seinasta umfar varð telvað sunnudagin.

John Arni hevur hevur havt eitt sera gott ár 2000 tá talv viðvíkur. Hann hevur otað seg framum John Rødgaard og Heina Olsen í rating og er tí nú nummar eitt á ratinglistanum í Føroyum.

Kravið at ogna sær IM norm í Stokkhólmi varð seks stig av níggju møguligum, men hendan vón brast skjótt hjá John Arna. Hann fekk nevnliga bert eitt stig burturúr fimm teimum fyrstu talvunum. Men John Arni er treiskur av lyndi, og tað prógvaði hann við at vinna trý tey næstu talvini og fekk sostatt fýra stig til hølvdar undan síðsta umfari. Sera flott komið aftur.

John Arni møtti vinnaranum av kappingini, Rasmus Skytte úr Århus í síðsta umfarinum og tapti, men sum heild ein rímiliga góð kapping hjá John Arna og vónandi fleiri av tí slagnum í framtíðini.



*Sum nakað nýtt, verður í ár skipað fyri serstakari kapping í snartalvi*

# Kappróðurin

*Í mikudagsblaðnum hava vit stóra frásøgn frá kappróðrinum á eystanstevnu*



Næsti FM-róðurin á árinum varð rógvin í Runavík, har eystanstevna var um vikuskiftið.

Sum vanligt, varð talan um nakrar sera spennandi róðrar, meðan aðrir sjálvandi ikki vóru eins spennandi, og serliga gjørdi hetta seg galdandi hjá 5-mannaførunum hjá dreingum, og 6-mannaførunum hjá kvinnunum.

Millum mest merkisverdu úrslitini var, at Nólsoyingruin eftir at hava verið fleiri ár í dvala aftur varð ovast á sigursskamlinum.

Lesið stóru frásøgnina frá eystanstevnuróðrinum í mikudagsblaðnum.

# Tannleyst í Fuglafirði

*2. deild: Dysturin millum ÍF og EB/Streym, verður ikki varðveittur í hugaheiminum fyri undirhaldandi fótbóltsspæl*

JÁKUP MØRK

ÍF-EB/Streymur 0-0

Líkindini fyri einum spennandi dysti millum tvey av ovaru liðunum í deildini vóru góð, tá ÍF tók móti gestunum úr Sundalagsleiðini leygardagin.

Bæði liðini hava higartil í ár staðið seg rættuliga væl í deildini. Serliga fyri EB/Streym hevur hetta veirð eitt sindur óvæntað, tí nógvir ungir leikarar í ár eru komnir á liðið, meðan Fuglfirðingar sum niðurflytarar úr bestu deildini, mugu roknast til favorttarnar at vinna beinleiðis uppflytingarsessin.

### Einki bit í

Sum so mundi spæli heldur ikki vera av eini leið leygardagin.

Sum skilst, royndu bæði liðini meginpartin av tíðini at spæla bólt, heldur enn at sparka bólt.

Trupulleikin var tó, at meðan tað ofta sá vakurt út, tá spælt varð niðan eftir vøllinum, so gekk uppspælið alt ov seint fyri seg, soleiðis at verjurnar høvdu alt ov góða tíð at umstilla seg.

### Tilvildin ráddi

Eitt sindur sigandi fyri dystin, so vóru at kalla eingir málmøguleikar í teir 90 minuttirnar.

Gestirnir vóru tó nær við, tá Jón Sigurd Gleiðsheygg skallaði beint við síðuna av eftir hornaspark, meðan fuglfriðingar tað einu ferðina høvdu eitt drønandi langskot, sum helst hevði spílað meskararnar út, um tað rakti málið.

Sostatt vóru næaskastu royndirnar heldur úrslit av tilvild enn málsóknum spæli, og alt í alt var tað í lagi, at dysturin endaði málleysur.

### ÍF skal nú vinna

Úrslitið hevur sjálvsagt við sær, at liðini bæði fingu eitt stig í part, og mett út frá fortreytunum, munnu teir hja EB/Streymi helst vera betri nøgdir um hetta.

Í øllum førum kann ikki roknast við nógv meira enn einum stigi, tá farið verður til Fuglafjarðar, og sostatt hevur úrtøkan í hesum førinum verið nærum optimal.

Fuglfirðingar mistu hinvegin enn eitt týdningarmikið stig, hjá teimum er nú umráðandi, at nakrir sigrar verða fingnir til høldar.

Oddaliðið, TB, er nú heili fimm stig framman fyri fuglfirðingar, og ansaast má eftir, at hetta ikki økist enn meira, áðrenn farið verður í summarfrí.

Komandi vikuskifti eigur ÍF torføran útidyst móti næstbesta liðnum hjá HB, og her má kravið til fuglfirðingar vera trý stig.

EB/Streymur skal tá á heimavølli royna seg móti NSÍ, sum higartil hevur staðið seg sera væl.

Vinnur heimaliðið tann dystin, mugu teir av álvara metast sum aktuellur partur í oddastríðnum, um enn tað er ein kanska óvæntað luttøka í hesum, sum talan tá verður um.




## Skrivari/ málsviðgeri

**Til trivnaðarfyrisitingina, sosialu deild verður søkt eftir skrivara/málsvigera at byrja skjótast tilber.**

**Høvuðsuppgávur**
Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá skrivaranum/málsviðgeranum eru:

- Skriva fundarskráir og fundarfrásagnir
- Fyrireika, geva boð og skipa fyri, tá fundir eru
- Edv-skráseta allar útgjaldingar eftir forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini, sum kommunan skal hava endurgoldið
- Hava eftirlit við og avstemma konti hjá sosialu deild
- Ymiskar málsviðgerðaruppgávur

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra relevanta útbúgving. Skal hava kunnleika til bókhald, tekstviðgerð og rokniark á brúkarastøði. Skal duga føroyskt til lítar.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 15. lønarflokki sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi íseinasta lagi 10. juli 2000.

Tórshavnar kommuna

WWW.TORSHAVN.FO








P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

## Bókhald/skrivstova

Fyri ein av kundum okkara í Tórshavn søkja vit eftir einum fólki til bókhald og skrivstovuarbeiði.

Arbeiðið umfatar bókhald og alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Tann, sum settur verður í starvið, má kunna arbeiða sjálvstøðugt. Praktiskar royndir eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. juni 2000. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at ringja til Rasmussen & Weihe, lokal 23.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo



## Jóansøkuhald í Neystinum

Tann 23. juni tendrar NEYSTIÐ jóansøkubál á sjónum framman fyri felagshúsinum.

Kl. 18 Grillin verður tendrað. Søla av grillmati, øli og sodavatni

Kl. 20–21.30 Johan Danielsen (Two of Us) spælir vísir og sangir

Kl. 21.30 Húsakórið syngur

Kl. 22.15 Koma 6-mannafør rógvandi við logandi faklum á árunum

Kl. 22.30 Báltala

Kl. 22.45 Bálið verður tendrað

Felagssangur saman við Húsakórinum

Kl. 24–02.00 Johan Danielsen spælir dansitónleik

**NEYSTIÐ**
Ishøj Havn



## Skrivstovuhølir til leigu

Skrivstovuhølir til leigu í bygningi ytst á Argjaboða. Bygningurin stendur í náttúruvøkrum umhvørvi, við sjóvarmálan.

Nærri fæst at vita hjá el & tele, tlf. 354 354.



## Leiðari søkist til Barnagarðin á Teigunum á Sandi

Sands Bygdarráð hevur sett á stovn ein dagstovn til børn í Sands kommunu í aldrinum 0-9 ár. Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum hevur pláss fyri 10 vøggustovubørnum og 20 barnagarðsbørnum.

Væntandi verður stovnurin klárur til at taka ímóti børnum 1.9.2000.

Hervið verður søkt eftir leiðara til dagstovnin á Sandi at byrja 1.8.2000.

Starvið er eitt fulltíðarstarv.

**Vit sóknast eftir leiðara:**

- Ið er útbúgvin pedagogur (el. líkn.).
- Hevur leiðaraevni.
- Hevur hug til at vera við at seta sín dám á endamálsorðingina fyri stovnin.
- Ið er opin fyri nýhugsan.
- Í samstarv við nevndina og foreldur gera teir fysisku karmarnar klárar.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til bygdarráðsskrivstovuna, tlf. 361034.

Umsóknir saman við viðmæli og upplýsing um útbúgving, skulu í seinasta lagi 10.7.2000 sendast til Sands Bygdarráð, 210 Sandi.

**Sands Bygdarráð**



## Vágs Skúli

Søkt verður eftir 2 lærarum skúlaárið 2000/2001. Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir við ljósriti av próvskjølum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 03. juli 2000.

**Vágs skúlanevnd**
900 Vágur



## FARTELEFONIR

*GSM*
*NMT 450 - NMT 900*
*Tráðleysar telefonir o. a.*
*Ymisk merki, so sum:*

MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA Connecting People
PHILIPS
BENEFON

SØLA & TÆNASTA
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045